# Rinda ognarskatt fyri bilin



Sjúrður Skaale, tingmaður fyri Tjóðveldi, vil nú hava landsstýrismannin í fíggjarmálum at greiða frá, hví dieselbilar eru so nógv dýrari í vektgjaldi enn bensinbilar eru.

Hann spyr eisini um vektgjaldið ikki mest líkist einum ognarskatti enn einum brúksskatti.

Hann staðfestir, at vektgjaldið er helst hugsað sum eitt brúksgjald, men at tað virkar meiri sum ein ognarskattur, tí bileigarar fáa rokningar fyri at eiga nakað - og tað er uttan mun til, hvussu nógv teir brúka almennu vegirnar.

Tí spyr Sjúrður Skaale, um tað ikki hevði verið rættari at lagt vektgjaldið oman á brennievnið.

Tungir bilar brenna jú meira enn lættir bilar, og verður vektgjaldið lagt á brennievni, verður tað tann, sum slítur vegirnar mest, sum eisini rindar mest.

Hinvegin sleppur tann, sum koyrir lítið, undan at rinda hendan »ognarskattin«.

## Meira skatt í Sørvági

1. ársfjórðing í ár hevur Sørvágs kommuna fingið 7,6 mió krónur inn í skatti. Sama tíðarskeið í fjør var upphæddin 7,3 mió. Hetta er ein øking uppá slakar 283.000 krónur, ella ein øking uppá 3,83%. Meginparturin av økingini stavar frá økingini í mars í ár, sum var 254.216 krónur. Kommunan hevur bara í mars í ár fingið 2,9 mió krónur, ímóti 2,6 mió í mars mánaði í fjør.



# Breiðband til havs

**SAMSKIFTI Føroya Tele bjóðar nú breiðband út á 60 fjórðingar – nevnt SjóNet. Ferðin er upp í sjey Mbit/s**

Eirikur Lindenskov

– SjóNet gevur nú okkara sjófólki møguleika fyri skjótum interneti umborð, sigur Føroyar Tele, sum í gjár kom við nýggja tilboðnum.

Føroya Tele hevur sett fýra sendistøðir upp, sum senda breiðband út á sjóøki kring allar Føroyar. Sostatt fáa skip og bátar, sum sigla í føroyskum sjógvi, stórt sæð somu møguleikar fyri nútímans breiðbandssamskifti, sum fólk á landi hava.

Skip og bátar, sum vilja hava breiðband umborð, skulu hava eina uttandura antennu fyri at móttaka 3G signalið. Við hesum ber til at hava tráðleyst internet á skipinum, og um neyðugt ber til at leggja kaðalar, soleiðis at internetið er tøkt á øllum skipinum.

– Vit vilja við hesum geva okkara sjófólk somu tilboð at samskifta og dagføra seg, sum fólk á landi hava. SjóNet inniber stórar fyrimunir, sum geva betri samskiftismøguleikar millum reiðarí og skip. Fjarstøðan verður ikki longri enn hjá arbeiðsplássum á landi, og manningin kann hava beinleiðis samband við vinir og familju, nær tað skal vera, sigur Hans Jákup Langgaard, leiðari á Vinnudeildini hjá Føroya Tele.

SjóNet verður marknaðarført við slagorðinum *»fá alt við umborð«*, ið kann skiljast breitt. Tað er skjótt at dagføra seg við at hoyra og lesa tíðindi ella síggja Dag og viku. Tað er lætt at fylgja familju og vinum, t. d. á Facebook, og harvið kanst tú halda sosiala netverkið viðlíka, eins væl og sat tú við telduna heima við hús.



SjóNet koyrir á 900 MHz, sum gevur møguleika fyri høgum breiðbandsferðum heilt út á 60 til 70 fjórðingar. Til ber at tekna hald við ymsum ferðum. Lítla haldið hevur eina ferð upp til 2 Mbit/s, vanligt hald er upp til 5 Mbit/s og stórt er upp til 7 Mbit/s. Tað er Wikmar, ið setir upp SjóNet.

SjóNet virkar frá 5. apríl. Føroya Tele er við á Fish Fair ráðstevnuni, sum er í døgunum frá 5. til 7. apríl, har eisini SjóNet verður víst fram.

# Fiskivinnan í fokus hjá Tjóðveldi

**POLITIKKUR Í annaðkvøld klokkan 19 skipar Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag fyri almennum fundi um fiskivinnupolitikk í Miðlahúsinum**

Eirikur Lindenskov

Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen leggja uppskotið fram. Fólk úr vinnuni verða opponentar.

Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag sigur, at flest øll, sum viðgera fiskivinnuna eru samd um, at ein loysn má finnast á teimum trupulleikum, sum eru í fiskivinnuni.

– Verandi fiskiloyvi ganga út í 2018, og Tjóðveldi hevur higartil einasta boð uppá, hvør skipanin eigur at verða. Skalt tú reka fiskivinnu í dag, mást tú eisini keypa rættin at fiska frá einum øðrum á privata marknaðinum. Og royndirnar sýna, at hesin rættur kann kosta minst fimm-tíggju ferðir so nógv, sum skipið sjálvt kostar. Tí eru tey reiðarí, sum eru í vinnuni í dag – og kapitalsterk útlendsk feløg – í veruleikanum tey einastu, sum hava møguleikan at reka fiskarí í Føroyum, sigur Tjóðveldisfelagið.

Felagið sigur, at tann, sum keypir skip, má eisini rinda kapitaliseraða virðið á rættinum at fiska í óendaliga tíð fram. Tá prísurin á fiskirættindum verður lagdur omaná, hefta skipini fyri eini nógv størri skuld, enn tey eru verd. Sanna virðið á hesum rættindum kennir ongin, og tí er váðin, ið tikin verður, sera stórur. Hetta er eisini galdandi, tá rættindi verða seld millum skip, sum longu eru í vinnu.

Tjóðveldi hevur fleiri ferðir havt sítt uppskot á tingborði og hevur í eina tíð ferðast kring landið við uppskotinum um almenna tilfeingisbúð, sum er eitt boð uppá, hvussu vit kunnu koma okkum burturúr tí monopolisering, sum verandi skipan leggur upp til, og sum er eitt boð uppá eina fíggingarleist, sum tryggjar, at tað eru tey bestu, sum sleppa framat ogn Føroya fólks.

– Uppskotið hjá Tjóðveldi er eisini eitt greitt boð uppá, hvussu eitt nýtt tilfeingi sum makrelurin kann umsitast og bjóðast út. Hevur tú hug at hoyra meira um uppskotið, sum fleiri og fleiri tykjast at taka undir við, so hevur tú møguleika at hoyra um uppskotið og gera vart við tína hugsan, sigur Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag, sum heilsar øllum vælkomin á fund í Miðlahúsinum.